Føroysk tíðindafólk á kunningarferð um olju:

Skulu vitja boripall í Norðsjónum

Í hesum døgum eru fýra føroysk tíðindafólk á áhugaverdari og ikki sørt spennandi kunningarferð í Noregi og Bretlandi. Tey eru boðin av teimum trimum stóru oljufeløgunum Statoil, Mobil Oil og Enterprice at vitja støðir teirra í Stavanger, Aberdeen og London.

Endamálið við ferðini er at kunna føroysk tíðindafólk um oljuvinnu og spurningar við tilknýti til hesa vinnu og síðani sjálvandi eisini at upplýsa um, hvussu tey umrøddu trý oljufeløgini, sum herfyri fóru í eitt samarbeiði við føroysku undirgrundini fyri eygað, kunnu hugsa sær ein útvikling á økinum.

Í Stavanger verður høvi hjá tíðindafólkunum at fáa nágreiniligan kunnleika um, hvussu oljuvinnan í Noregi er uppbygd og virkar bæði tekniskt og eisini lógarliga. Her verður ikki minst lagdur dentur á, hvat norðmenn sjálvir vænta sær av komandi kanningunum á djúpum vatni, úti á sjálvum landgrunninum og kantinum, sum verður kallað fyri The Western Slope, og sum Føroya-økið eisini er ein partur av.

Stjórin fyri leiting og gransking hjá Statoil í Danmark, Svein G. Larsen, fer at halda fyrilestur undir heitinum »Fra Siri til Lopra« – perspektiver for dansk og færøsk kontinentalsokkel.

Atlantic Margin Group
Mobil
STATOIL
Enterprise Oil

Tey trý oljufeløgini, sum hava tikið upp samstarv við oljuleiting í Føroyum fyri eygað

Boripallurin Nelson er ein av teimum nýggju í bretska oljuídnaðinum

Týsdagin gongur leiðin við tyrlu úr Stavanger til Aberdeen, har Mobil Oil er vertur. Her verður serliga greitt frá nýggju teknologiini, sum skal gera tað gjørligt á lønsaman hátt at fáa olju upp á djúpum vatni. Hetta er tann tøknifrøðin, sum bretar eru við at seta upp á havbotninum vestan fyri Hetland í sambandi við fyrstu framleiðsluna úr hesum nýggja oljuøkinum í heila tikið.

Mikudagin skulu teir fýra føroysku journalistarnir út í markina, teir skulu við helikoptara teir 200 fjórðingarnar eystur í Norðsjógvin til stóra og nýggja bori- og framleiðslupallin Nelson. Tað er felagið Enterprice, sum stendur fyri framleiðsluni har.

Allur mikudagurin fer til vitjan umborð á pallinum, har tað arbeiða nakrir hundrað mans.

Hósdagin gongur leiðin til London, har Enterprice Oil er vertur. Har verður høvi at hoyra, hvussu skatta- og lógarverkið er skipað í oljuídnaðinum í ymsum londum.

Tey fýra tíðindafólkini, sum eru við á kunningarferðini, eru Tróndur Djurhuus frá Sjónvarp Føroya, Jógvan Arge frá Útvarp Føroya, Dia Midjord frá Dimmalætting og Jan Müller frá Tíðindablaðnum Sosialinum.

Teir triggir vertirnir hjá føroysku tíðindafólkunum, sum nú eru á kunningarferð í Noregi og Bretlandi. F.v. Bjørn Vidar Herøyen frá Statoil, Phil Sands frá Mobil og síðani ein av stjórunum hjá Enterprice.
Mynd Jan Müller

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
18. mai 1995,
kl. 09.00
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 145 h, 410 Kollafirði (AS nr. 62/95).**
Ognin er eini sethús 122 kvm til viddar í kjallara og stovuhædd (stovuhædd og 76 kvm av kjallara innrættað). Gjørd av timbri og takt við aluminium. Bygd í 1984. Stykkið er 451 kvm til støddar.
Tvingsilssølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 950137)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.
Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.
Føroya Fútarættur,
tann 20. apríl 1995
Henrik Engell Rhod
dfm.

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
18. mai 1995,
kl. 11.30
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 673 b, íbúð 26, Tórsbyrgi 26, Tórshavn (AS nr. 51/95).**
Ognin er ein eigaraíbúð, niðara hædd 69 kvm til viddar, havi 26 og úthús 13 kvm. Gjørd av timbri á betonggrund og takt við jarni. Bygd í 1976..
Tvingsilssølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 950099)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.
Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.
Føroya Fútarættur,
tann 20. apríl 1995
Henrik Engell Rhod
dfm.

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
18. mai 1995,
kl. 09.50
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 1qd. Andrassargøta 7, Hoyvík (AS nr. 9/95).**
Ognin er eini sethús 119 kvm til viddar í kjallara og stovuhædd (alt innrættað). Gjørd av timbri á betonggrund og takt við aluminium. Bygd í 1990. Stykkið er 504 kvm til støddar..
Tvingsilssølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 950019)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.
Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.
Føroya Fútarættur,
tann 20. apríl 1995
Henrik Engell Rhod
dfm.

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
18. mai 1995,
kl. 10.10
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 137, Elduvík, ognin er í Funningsfirði, (AS nr. 7/95).**
Ognin er eini sethús 81 kvm til viddar í tveimum hæddum. (innrættað er 148 kvm) Gjørd av betong og takt við jarni. Bygd í 1960. Sambært Matrikulstovuni er stykkið ikki víddarroknað, men er uml. 594 kvm til støddar.
Tvingsilssølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 11145 (j. nr. 950013)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er um at síggja ognina.
Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.
Føroya Fútarættur,
tann 20. apríl 1995
Henrik Engell Rhod
dfm.